Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í vinnumálum

Evni: Asfaltering og liðugtgerð

Spurningar:

1. Hvørjir vegir verða umvældir og asfalteraðir av nýggjum í ár?
2. Hvussu er metingin gjørd av hvørjir vegir skulu raðfestast við játtanini, sum er?
3. Hvørji atlit verða nýtt í metingini?
4. Hvønn leiklut hevur landsstýrisfólk í raðfestingini?
5. Hvør er metti kostnaðurin av at gera landsvegin millum Klaksvík og Norðoyri?
6. Hvør er metti kostnaðurin av at gera vegin lidnan millum tunnilsmunnan og bygdina í Kunoy, og er hetta nakað, sum ætlanin er at fremja komandi árini?
7. Verður ein dagføring av vegnum til Fámjins raðfest hægri enn at til dømis at gera byrgingina um Haraldssund lidna?

Viðmerkingar:
Tað er ein sannroynd, at hóast játtanin til asfaltering hjá Landsverki varð hækkað í seinasta samgonguskeiði, so er støðan framvegis soleiðis, at Landsverki ikki kemur runt at asfaltera allastaðni, har tað er neyðugt. Tað merkir, at á hvørjum ári er neyðugt at gera eina raðfesting inni í Landsverki, og henda raðfesting hevur ikki verið serliga gjøgnumskygd.

Samstundis hoyra vit, at landsstýrismaðurin vil raðfesta vegin til Fámjins, har tunnil júst er gjørdur, tí tað rætta er at gera tingini liðug, tá mann er onkustaðni. Tí eisini spurningarnir um Kunoyarvegin og sambandið um Haraldssund. Bæði tvey verkætlanir, sum ongantíð vórðu gjørdar lidnar.

Á Løgtingi, 13.08.2026

Eirikur í Jákupsstovu